

*Joseph Y. Bassene (TB) skorar til 2-1 móti 07 Vestur í Sørvági*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## 07V - TB 2-2 (1-1)

Dómari: Rói Jacobsen

0-1: Teitur Justinussen, 26.
1-1: Milan Pejcic, 37.
1-2: Joseph Y. Bassene, 85.
2-2: Emil Mikkelsen, 90.

## Vík II - HB II 1-3 (1-2)

Dómari: Andreas Josephsen

0-1: Óli Arge, brts., 20.
1-1: Per Gregersen, 25.
1-2: Tórður Hentze, 35.
1-3: Jógvan Andrias Nolsøe, 56.

## KÍ - EB/S II 3-2 (0-0)

Dómari: Alex Troleis

1-0: Henry Heinesen, 3.
2-0: Steffan Kalsø, 41.
2-1: Poul G. Olsen, 63.
2-2: Andru Poulsen, 76.
3-2: Høgni Madsen, 90.

## B68 II - AB II 0-1 (0-0)

Dómari: Dia Lamhauge

0-1: Niels Johansen, 75.

## NSÍ II - FCH 0-3 (0-0)

Dómari: Bent Tommy Linklett

0-1: Tony Rasmussen, 64.
0-2: Tony Rasmussen, 72.
0-3: Tony Rasmussen, 90.



*KÍ kvinnur eru føroyameistarar*

## EB/S - MB 10-1 (6-0)

Dómari: Elsa Andreasen

1-0: Sigrun Kalsoy Kristiansen, 6.
2-0: Íðunn Magnussen, 11.
3-0: Sigrun Kalsoy Kristiansen, 13.
4-0: Mildrið Djurhuus, 14.
5-0: Sigrun Kalsoy Kristiansen, 22.
6-0: Sigrun Kalsoy Kristiansen, 38.
7-0: Íðunn Magnussen, 56.
8-0: Sigrun Kalsoy Kristiansen, 62.
8-1: Heidi Maria Akselsen, 75.
9-1: Sólja T. Eiðisgarð, 77.
10-1: Rudi Zachariasen, 85.

## AB - Skála 3-0 (2-0)

Dómari: Elsa Andreasen

1-0: Mona Breckmann, 11.
2-0: Olga Kristina Hansen, 33.
3-0: Mona Breckmann, 67.

## Vík. - EB/S 2-0 (1-0)

Dómari: Magnus Jørmundsson

1-0: Rósa Magnussen, 10.
2-0: Sanna Dalbø Jacobsen, 88.

## Føroyska 1. Deild menn

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 24 | 16 | 4 | 4 | 71 | 22 | +49 | 52 |
| 2 | 07 Vestur | 24 | 15 | 7 | 2 | 66 | 23 | +43 | 52 |
| 3 | TB | 24 | 13 | 5 | 6 | 52 | 29 | +23 | 44 |
| 4 | EB/Streymur II | 24 | 11 | 6 | 7 | 54 | 38 | +16 | 39 |
| 5 | HB II | 24 | 11 | 3 | 10 | 50 | 58 | -8 | 36 |
| 6 | Víkingur II | 24 | 9 | 4 | 11 | 36 | 48 | -12 | 31 |
| 7 | FC Hoyvík | 24 | 7 | 5 | 12 | 33 | 45 | -12 | 26 |
| 8 | AB II | 24 | 8 | 2 | 14 | 27 | 62 | -35 | 26 |
| 9 | NSÍ II | 24 | 6 | 7 | 11 | 30 | 52 | -22 | 25 |
| 10 | B68 II | 24 | 1 | 3 | 20 | 19 | 61 | -42 | 6 |

## Føroyska 1. Deild kvinnur

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 19 | 16 | 3 | 0 | 94 | 9 | +85 | 51 |
| 2 | AB | 20 | 15 | 2 | 3 | 95 | 14 | +81 | 47 |
| 3 | Skála | 19 | 8 | 4 | 7 | 33 | 28 | +5 | 28 |
| 4 | Víkingur | 19 | 7 | 1 | 11 | 22 | 60 | -38 | 22 |
| 5 | EB/Streymur | 19 | 3 | 4 | 12 | 24 | 61 | -37 | 13 |
| 6 | MB | 18 | 0 | 2 | 16 | 9 | 105 | -96 | 2 |

# Madsen sum Roberto Carlos




*Høgni Madsen skifti til KÍ í summarsteðginum í fjør*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**1. DEILD** Dómarin hevði lagt fimm minuttir afturat. Tíðin var farin. Høgni Madsen rann seg í góða støðu og fekk bóltin í føturnar. Miðvallarin legði leðurkúluna til rættis fyri høgra beinið og valdi at senda seinasta skotið í dystinum avstað frá brotsteigarmarkinum

Uni Holm Johannesen

Og bólturin sat í netinum handan Trónd Vatnhamar, sum vardi málið hjá EB/Streymi.

Høgni Madsen var stóra hetjan í Klaksvík í vikuskiftinum. Miðvallarin, sum er serliga eyðkendur fyri sín stríðsvilja á vøllinum, syrgdi í seinastu sekundunum fyri, at KÍ tryggjar sær uppflyting á Tvøroyri mikukvøldið, um klaksvíkingar fáa stig á Sevmýru.

Málið var framúr. Heimasíðan hjá KÍ skrivar, at Høgni Madsen minti ikki sørt um brasilianska Roberto Carlos, tá fuglfirðingurin sendi skotið avstað.

3-2 til heimaliðið.

Og so floytaði Alex Troleis, dómari, fyri seinastu ferð.

### Hevur flutt nógv

Høgni Madsen flutti til KÍ í summarsteðginum í fjør.

At flyta felag hevur verið eitt av eyðkennunum hjá 25 ára gamla fuglfirðinginum.

Seks ferðir hevur hann skift úr einum felag og í annað.

Hann verður serliga mintur fyri løtuna í 2006, tá Tony Paris skifti Madsen út í heimadystinum móti GÍ. Aftaná at hava verið í brúsuni, kom hann inn um gyrðingina og yvir til venjarabeinkin, har hann við ómisskiljandi faktum segði bæði Tony Paris, øllum áskoðarunum og myndatólunum hjá 3-2, hvat hann helt um venjaran.

Madsen hevur umboðað ÍF, GÍ, KÍ og NSÍ á sínari yrkisleið higartil.

Hann er skrásettur fyri tríggjar landsdystir fyri Føroyar.

### Restar lítið í

07 Vestur og KÍ kunnu staðfesta mikukvøldið, at liðini, sum fluttu niður úr bestu deildini í fjør, skulu spæla í Vodafonedeildini í 2011.

Úrslitini í vikuskiftinum lagaðu seg soleiðis, at niðurflytararnir verða uppflytarar, um liðini fáa eitt stig afturat í seinastu fýra dystunum. Ella, um TB snávar.

07 Vestur spældi javnt á heimavølli móti TB. Emil Mikkelsen javnaði fyri heimaliðið í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat. Úrslitið var 2-2.

FC Hoyvík er nú á sjeynda plássinum. Hoyvíkingar hava verið undir niðurflytingarstrikuni seinastu mánaðirnar. Tony Rasmussen skeyt hattrick, tá FC Hoyvík vann 3-0 á útivølli móti næstbesta liðnum hjá NSÍ.

uni@sosialurin.fo